

*Gustaf Gründgens, sum fór í Nazi-valdsins veitslu, her avmyndaður í sjónleikinum Snobburin, í Berlin 1946*



*Katharina Pringsheim, 1905*

Higartil eru, í hesi monumentalu útgávu, útkomin brøv, essay, tær fyrru stuttsøgurnar, *Gandafjallið*, *Buddenbrooks* og *Königliche Hoheit*. Mangur Mann-fjeppari situr í løtuni og bíðar ótolin og alspentur eftir *Doktor Faustus*, sum átti at verið komin nú í summar, men er nakað seinkað og (so søgdu tey fyri mær í Buddenbrookhúsinum) helst kemur seinni í heyst. Tað verður veitsla!

### Klaus Mann

Eina tilveru sum flogvit og olympiari livir tú kortini ikki óstraffaður. Thomas Mann var sum rithøvundur eitt arbeiðsgrev, umframt stuttsøgur, skaldsøgur, essay, brøv, ofta bæði long og innihaldsrík, skrivaði hann dagbók alt lívið, og á ein hátt kann ein siga, at sjálv lívsins pallseting lá honum meira á hjarta enn lívið sjálvt. Hansara børn vuksu upp í einum sjáldsama mentaðum umhvørvi, við atgongd til skaldskap, tónleik, við kunnleika um (og ofta eisini samrøðum við) tíðarinnar mætastu andsmenni, og við upplestri heima sum dagligum marglæti.

Klaus Mann, føddur í 1906, kom at vera tann ævigi Zeussonurin, kálvføddur við øllum sum ríkið á Olympos hevði at bjóða og samstundis á onkran hátt ævinligur fangi undir tí velduga skugga, sum hetta sama fjall varpaði. Ikki tí, hann gjørdi tað hann var mentur til at sleppa út undan faðirsins veingjabreiði. Thomas Mann var, sum mongum kunnugt, við einum stórum parti av sær sjálvum samkyndur, men hann valdi at liva eina borgaraliga tilveru, sum giftur maður við seks børnum. Sítt serliga kynsliga frávik læt hann bera ávøkst í sínum verkum, tað ítøkiliga lopið niður í "avgrundina" gjørdi hann ongantíð.

Klaus Mann, eisini samkyndur, livdi sambært síni natúr, valdi nettupp ikki ta abstraktu tilveruna, men tvørturímóti tað ítøkiliga, sansaliga lívið, og var eisini sum rúsevnisnýtari á mangan hátt, um ein kann taka so til, undan síni tíð. Eisini hvat viðvíkir politikki, formaði hann sítt lív í andsøgn til pápan. Klaus Mann fekk tíðliga áhuga fyri sosialismuni, hevði helst einki av tí ópolitisku tjóðskaparhugsan, sum eyðkendi pápan til endan á fyrra heimsbardaga, og var í 30-árunum virkin og snjallur antinazistur.

### Mephisto

Klaus Mann var ein ógvuliga virkin blaðmaður og rithøvundur, men serliga hvat skrivingarlag viðvíkir, valdi hann heilt aðra kós enn pápin. Millum hansara kendastu skaldsøgur eru *Symphonie Pathétique*, 1935, ein lýsing av tónaskaldinum Tsaikovskij, *Mephisto*, 1936 og *Der Vulkan*, 1936. *Mephisto* hevur hann bygt upp rundan um ævisøguna hjá sínum fyrrverandi vini og svági, sjónleikaranum Gustaf Gründgens. Meðan Klaus Mann, eins og hansara foreldur, búði í útlegd eftir 1933, valdi Gründgens at verða búgvandi í Nazi-Týsklandi, hann helt fram at spæla sjónleik, gjørdist vinmaður hjá Göring, fekk í 1934 starv sum leikhússtjóri í Berlin og gjørdist í 1936 preussiskur ráðharri.

*Mephisto,* sum István Szabó hevur gjørt til film, við vandni og einum ávísum strangleika í stílinum, og har Klaus Maria Brandauer hevur høvuðsleiklutin, er søgan um tann æviga opportunistin, sum velur at fara í valdsins veitslu, men misskilir hetta sama vald, undirmetir tess eirindaloysi og ráleika og verður tess rukka. Skaldsøgan verður mett at vera høvuðsverkið hjá Klaus Mann.

Aðrar av hansara bókum bera kortini vitnisburð um, hvussu hættisligt tað kann vera at bjóða Jupiter av. Thomas Mann er og verður meistarin, og hann ið roynir at dystast við hann má lúta. Og Klaus Mann, við sínum ofta stuttu og ov lítið kíndu setningum og sínum journalistiska stíli, hevur helst ilt við at fóta sær í 21. øld. Umframt *Mephisto* verður tað kanska bókin *Der Wendepunkt*, ein framúr vælskrivað og áhugaverd tíðarlýsing, har hann fortelur um tey andsmenni, sum hava ríkað seg og tey mongu listafólk, hann hevur kent, sum verður standandi.

### Sjálvsagans sigur

Staddur yvir av tí totalitera valdinum, valdi Klaus Mann, í mótsetning til Gustaf Gründgens, at gera uppreistur og tað ikki við mýkindum. Í 30-árunum gav hann út tíðarritið *Die Sammlung*, har hann royndi at savna tíðarinnar fremstu andsmenni og, hóast tey umboðaðu so ymisk sjónarhorn sum liberalismu, javnaðarhugsan og kommunismu, at fáa tey at fylkjast í tí mentanarliga stríðnum móti nazismu og fascismu.

Eftir kríggið royndi hann, í sama anda, at fylkja liberal og kommunistar um arbeiðið fyri friði. Hann kendi seg heima í USA, men tá ið tað óhugnaliga McCarthy-rákið tók seg upp, var hann, púra órættvíst, skýrdur sovjetskur ørindasveinur. Hann tók seg av døgum við heilivági í einum hotelli í Cannes tann 21. mai 1949.

Thomas Mann doyði í 1955 og livdi sostatt sín elsta son av við seks árum. Hann var virkin til tað seinasta og gav í 1954 út skaldsøguna *Felix Krull*. Sum longu nevnt livdi hann eitt vælskipað, borgaraligt, heldur litbleikt lív, eitt snirr við penninum, eitt syft við sigarini av og á, nærri kom hann, myndaliga talað, neyvan tí gessiga og falliska. Men líkasum holdsins lystur av tí eysturlendska yogameistaranum verður skaptur um til kundalinimátt og verður vegur til nirvana og *samhadhi*, nældu úr hesi sparsomu tøðu nøkur av teimum háleittastu prosaverkunum í 20. øld. Hansara listarligi arvur stendur í dag sum fullgóður vitnisburður um sjálvsagans sigur.



*Klaus Mann (vinstrumegin) saman við vinmanninum Fritz Landshoff*